## Aðalfundur í Oljutinginum við fyrilestri »DONG á djúpum vatni«

AÐALFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Á aðalfundinum hjá Oljutinginum heldur Jan Terje Edvardsen, Senior Vice President, Exploration hjá DONG fyrilestur um um teirra strategi og vánir til Atlantsmótið.

Aðalfundurin verður mikukvøldið 2. juni 2004 kl. 19.00 á Hotel Føroyum.

DONG (Dansk Olie og Naturgas) er danskt oljufelag, ið hevur verið við í øllum loyvum, sum eru latin í donskum øki síðan 1984. Seinastu árini hevur DONG víðkað um oljuleitingarvirksemi sítt til at fevna um alt Norðsjóvarøkið, umframt Føroyar og Grønland. DONG hevur stórt virksemi á Atlantsmótinum, bæði í bretska og føroyska økinum.

Leggjast kann afturat at DONG, sum eisini er størsti veitari av natúrgassi til danska marknaðin hevur seinni árini lagt seg eftir at vera veitari av orku í breiðum týdningi. Tí hevur DONG keypt seg inn í el-feløg og hevur keypt og bygt vindmyllur bæði í Danmark og Bretlandi. Felagið hevði í 2003 ein umsetning á 14 mia. kr. og ein egin-pening á 17 mia. kr. Í felagnum arbeiða eini 1200 fólk. Danska stjórnin hevur kunngjørt, at hon hevur í umbúnað at einskilja DONG.

– Oljutingið hevur til endamáls - sum ein tvørfakligur felagsskapur fyri fólk, ið starvast í oljuvinnuni, ella sum hava áhuga fyri oljuvinnu - at geva limum sínum høvi til at kunna seg um oljuvinnu og tað virksemi, ið er knýtt at henni. Hetta verður gjørt við at skipa fyri fundum, fyrilestrum og øðrum hóskandi tiltøkum limanna millum og fyri almenninginum, sigur nevndin í Oljutinginum.




*Tað verður Kristian Petursen, sum her sæst høgrumegin, sum verður leiðari á lánideildini hjá Kaupthing Føroyar*

# Krútsterkur avbjóðari

**Kaupthing Føroyar økir nú um tænastu-útboðið. Lán til vinnulívið er nýggja skotið á skjótt vaksandi Kaupthing-stammuna, sum í bakhondini hevur 9. størsta bankan í Norðanlondum**

FÍGGING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nú kemur eitt nýtt alternativ á marknaðin, tá tosast skal um fígging til vinnulív, kommunur, stovnar v.m.

Í lýsingum í bløðunum hevur Kaupthing Føroyar nevnliga boðað frá, at tey nú eisini vilja sleppa upp í part, tá pengar skulu lænast út.

### Komplett útboð

Talan verður tó ikki um privatlán til bilar, sethús og annað. Í øllum førum ikki í fyrsta umfari.

Tað er nevnliga fyrst og fremst vinnan, sum kemur at fáa hendan nýggja møguleikan, sigur Petur Holm, stjóri í Kaupthing Føroyar.

– Hetta gera vit fyrst og fremst, soleiðis at vit kunnu hava eitt meira komplett útboð til vinnulívið, har vit longu nú eru rættiliga aktivir, sigur stjórin. Og hann leggur afturat, at orðið »vinna« í hesum føri skal fatast í breiðum týdningi, tí stovnar, kommunur og onur kunnu eisini vera við í hesum.

Spurdur, um hetta ikki eisini kann síggjast sum eitt slag av »hjálp til sjálvhjálp« ella sum ein háttur at nøra um tey, sum longu eru á virkisøkinum hjá Kaupthing, sigur stjórin, at tað heldur hann ikki.

– Vit seta so onga treyt um, at lánsøkjarar eru aktivir í øðrum av okkara veitingarøkjum. Sum sagt, so meta vit við hesum, at vit koma at hava eitt meira komplett útboð til vinnulívið. Sjálvandi eru tey altíð vælkomin á onnur veitingarøki hjá okkum, men tað er so eingin treyt.

Men tá tit soleiðis bjóða tykkum fram til vinnulívsfígging. Er talan so um nøkur ávís projekt, har tit ætla tykkum inn.

– Sjálvandi síggja vit nakrar áhugaverdar møguleikar, men tað er ikki einvíst hesar, sum vit leggja okkum eftir. Vit koma sum ein nýggjur útbjóðari á marknaðin, og so taka vit kappingina upp við hinar útbjóðararnar, sigur Petur.

Millum útbjóðararnar á føroyska marknaðinum er sum kunnugt eisini Føroya Sparikassi. Sparikassin eigur sum er part av partabrøvunum í Kaupthing Føroyar, men hetta er ikki nakað, sum fer at ávirka marknaðarstøðuna, sigur Petur.

– Kaupthing er eitt sjálvstøðugt felag, so tað verður í vanligari kapping við Sparikassan eins væl og onnur, sigur hann.

### Óavmarkað styrki

Tað verður Kristian Petersen, sum eisini er leiðari á vinnutænastuøkinum hjá Kaupthing, sum verður leiðari á nýggja veitingarøkinum hjá felagnum. Og hann ivast ikki í, at tey í Kaupthing væl og virðiliga verða kappingarfør á nýgg veitingarøkinum.

– Mest av øllum, so haldi eg, at vit við baklandi okkara hava eina stóra styrki og eina stóra vitan. Kaupthing er í løtuni níggjundi størsti bankin í norðanlondum við eini samlaðari fíggjarjavnvág á 55 mia kr. Tað merkir í veruleikanum, at tað ikki er nakað projekt í Føroyum, sum er so stórt, at vit ikki hava neyðugu fíggingarorkuna. Hartil er útboðið hjá Kaupthing av fíggingarmøguleikum somikið stórt, at vit stórt sæð kunnu bjóða tann fíggingarháttin, sum kundin ynskir. Tað er so nakað, sum vit eisini koma at meta um í hvørjum einstøkum føri, sigur hann.

Í fyrsta umfari verður avmarkingin tó tann, at talan bert verður um vanligar lánveitingar. Altso ikki um kassakredittir v.m., men hvørki Petur ella Kristian vilja útiloka, at hetta eisini kann gerast partur av útboðnum í framtíðini.

### Vinnan bíðar í spenningi

Og einki er at ivast í, at vinnan sær fram, at talan verður um enn ein útbjóðara á lánimarknaðinum. Fram til fyri ikki so nógvum árum síðani var tað so, at hetta var nakað, ið fyri tað mesta avmarkaði seg til bankarnar, men tá nýggja sparikassalóggávan varð sett í gildi, komu hesir eisini inn sum nýggir aktørar. Nakað sum alt fyri eitt hevði við sær harðari kapping um kundarnar, og sum hesir so aftur merktu í betri tænastu og lægri prísum.

Spurdir, hvørt enn eitt rentufall á marknaðinum er væntandi, nú Kaupthing kemur sum nýggjur útbjóðari á marknaðin, siga teir, at tað kunnu teir so ikki lova.

– Vit koma sum sagt nýggir inn á marknaðin, og vit fara so at taka kappingina upp við hinar. So má tíðin vísa, hvat hetta fer at merkja.

## Skjótur vøkstur



Tað var í mars mánaði í 2000, at Kaupthing byrjaði sítt virksemi í Føroyum. Upprunaliga var tað virðisbrævamekling, sum var høvuðsvirksemi felagsins, men nú fýra ár eru liðin, er skjótt at staðfesta, at útboðið av tænastum er nógv økt síðani tað.

Í dag fevnir virksemið um virðisbrævamekling, ognarrøkt, vinnutænastu, ráðgeving og nú eisini lánveiting.

Hartil er felagið ein av partaeigarunum í framtaksfelagnum, Notio, sum Kaupthing eisini umsitur, eins og felagið saman við øðrum eigur P/F Fastogn, sum millum annað eigur bygningarnar hjá SMS og Handilskjarnanum.

Hartil hevur Kaupthing eisini átt sín part í framhaldandi tilgongdini av einum føroyskum virðisbrævamarknaði, so ikki kann sigast annað, at enn virksemið er vorðið nakað væl meira víttfevnandi enn »bara« tað at keypa og selja virðisbrøv.

**-jm**



# Láturlig íløguraðfesting

**Formaðurin fyri Bitland, Tróndur Djurhuus, heldur tað vera heilt burturvið, at játtanin til gransking verður minkað. – Hon er alt ov lítil sum er, og átti at verið nógvar ferðir størri, sigur hann**

RÀÐSTEVNA
*Heri á Rògvi*
*heri@sosialurin.fo*

Føroyskt vinnulív skal liva av øðrum enn fiskivinnu. Tilfeingið skal í størri mun koma úr høvdinum á fólki og í talgildum skapi.

Bitland ella The Bitland er eitt samtak av føroyskum fyritøkum, sum flest allar hava tilknýti til føroysku KT-vinnuna. Endamálið hjá samtakinum er millum annað at lokka útlendskar risar innan KT-vinnuna til Føroya fyri at nýta Føroyar sum hátøkniligt royndarland. Formaðurin fyri samtakið, Tróndur Djurhuus, sum umboðar Føroya Tele, heldur, at vinnulívið í Føroyum er komið í ein óndan sirkul.

– Tað gongur ikki framhaldandi bert at framleiðs vørur við hala á. Vit mugu menna føroyska búskapin og gera framtíðari samfelagið liviligt fyri okkara børn við at menna vitanarstøðið og gera íløgur í nýggjar vinnugreinir, sigur Tróndur Djurhuus, sum persónliga segði seg ynskja, at Bitland samtakið kundi vera við til skapa grundarlag fyri einum føroyskum búskapi uttan blokkstuðul.

### Pengar til gransking

Útlendskar fyritøkur hava víst Bitland áhuga. Men sambært Tróndi Djurhuus leypa fyritøkur ikki uttan víðari á leystum eftir at gerast partur av føroysku bitunum.

– Útlendsku fyritøkurnar vilja tryggja sær, at tað er grundarlag fyri hesum í Føroyum. Her verður hugsað bæði um privatan áhuga, men ikki minst almennan áhuga, sigur Tróndur Djurhuus.

Hóast hann rósti landsstýrismanninum í vinnumálum fyri áhuga hansara fyri verkætlanini, so lat hann kortini ongan iva um eitt samtakið av privatu fyritøkunum vil hava almennu myndugleikarnar í Føroyum at gera munandi meira.

– Tað er heilt burtuvið, at tað játtanin til gransking minkar aftur í ár. Hon er alt ov lítil sum er, og átti at verið nógvar ferðir størri, sigur Tróndur Djurhuus, sum legði dent á, at skal úrslit spyrjast burutrvið, mugu føroysku politikararnir spæla ein størri og positivari leiklut.

### Trúgva upp á møguleikan

Tróndur Djurhuus kundi á ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum vísa á, at áhugin frá útlendskum fyritøkum ikki hevur bilað fyri Føroyar. Men sum nevnt er áhugin ikki treytaleysur.

Tað er fatanin hjá Tróndi Djurhuus og hinum í The Bitland, at vitanin og støðið í føroysku KT-vinnuni er so mikið, at grundarlag so avgjørt er fyri, at góð og lønandi úrslit kunnu spyrjast burturúr.

– Føroysku KT-fyritøkurnar eru sera ríkar í vitan - men heldur fátakari við kapatali, sigur Tróndur Djurhuus.



*Tróndur Djurhuus, formaður fyri Bitland, vil hava føroysku politikararnar at játta fleiri pengar til gransking*

# Endurskoða blokkin

**Forkvinnan í Radikale Venstre, Marianne Jelved, heldur, at tað kann gerast neyðugt at endurskoða blokkin. Men radikalar broytingar verða neyvan gjørdar í næstum**

RÀÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*




**Keypmannahavn:** Donsku politikararnir, sum luttóku á ráðstevnuni "Høvdið á blokkin" týsdagin, vóru á einum máli um, at ríkisfelagsskapurin er ein góður felagsskapur, sum tey ynskja at varðveita og verja. Men talan skal ikki vera um nakað tvang.

Umboð úr fýra donskum flokkum vóru tilstaðar við pallborðið í felagssalinum á Christiansborg. Tað var í sjálvum sær ikki so nógv nýtt at frætta frá teimum, men forkvinnan í Radikale Venstre, Marianne Jelved, kom í sínum innleggi inn á, at núverandi skipanin við blokkstuðulinum virkaði eitt sindur undarligt upp á hana, og hon helt tað neyðugt at vera neyðugt at taka eitt prát um eina endurskoðan av skipanini.

– Tað tykist ikki sum um, at skipanin virkar optimalt í løtuni. Eg haldi, vit eiga at seta okkum niður at hyggja at skipanini og kanna eftir, hvat vit kunnu gera. Tað vil eg gjarna vera við til, segði Marianne Jelved.

Men lyklaorðini eru eisini, at eingin avgerð skal takast uttan so, at føroyingar ynskja tað sjálvir. Og Men fyri Marianne Jelved er tað eingin trupulleiki at avtaka blokkstuðulin sum heild - um føroyingar ynskja tað.

– Sum heild haldi eg, at statsstuðul er nakað lort. Eg haldi, at vit kunnu taka blokkstuðulin burtur, um hann ger so nógvan skaða, segði Marianne Jelved sum aftursvar til orðini frá serliga grønlendska fólkatingsmanninum, Kuupik Kleist, um blokkstuðulin og framtíðina.

Hon vísir aftur, at hon ætlar sær at taka hetta málið upp við ein minniluta ella andstøðu í Føroyum ella Grønlandi.

– Eg sigi bert, at eg havi hug at tosa um tingini, sigur Marianne Jelved, sum millum norðuratlantisku sjálvstýrisrøddinrar var besti umtókti polikarin.

Í hesum døgum verður í Danmark tosað um, at Marianne Jelved kann gerast forsætisráðharri fólkatingsvalið, sum í seinasta lagi verður komandi ár. Men Marianne Jelved vil ikki siga nakað um, hvat vit kunnu vænta okkum av broytingum, um hon sum forsætisráðharri ella partur av einari komandi stjórn sleppur at ráða fyri borgum á Christiansborg.

– Vit skulu hyggja langt fram í tíðina og endurskoða skipanini leypandi, sigur Marianne Jelved.

### Nógv burturúr

Donsku politikararnir vóru settir á dagsskránni á ráðstevnuni um búskap hjá Norðuratlantsbólkinum undir yvirskriftini "Hvat vænta danir at fáa afturfyri blokkstuðulin?"

Umfram Marianne Jelved vórueisini Henrik Vestergaard úr Venstre, Frank Jensen frá Socialdemokratiet og Ole Sohn frá SF við pallborðið, og tey fingu øll møguleikan at svara upp á spurningin frá fyrireikarunum.

Donsku politikararnir valdu heldur at leggja dentin á tað meira kensluborna enn tað meira búskaparliga.

Øll vóru á einum máli um, at føroyingar og Føroyar vóru góðir at hava í ríkinum, og tað hevur einki við pengar ella blokkstuðul at gera. Og hóast tað ikki beinleiðis var svarað beint fram, so vóru tað á einum máli um, at blokkstuðulin skal vera við til at tryggja livistøðið í Føroyum, og Danmark fær nógv afturfyri - at vera í ríkisfelagsskapi við Føroyum og Grønlandi.

### Gjald fyri tænastur

Danski forsætisráðharrin og floksformaðurin hjá Venstre, Anders Fogh Rasmussen, hevur áður gjørt greitt, at blokkstuðulin eru at meta sum eitt gjald fyri tænastur, ið danski staturin hevur ábyrgdina av. Hóast umboðið fyri Venstre, Henrik Vestergaard, ikki legði so stóran dent á júst hetta týsdagin, so kann hann staðfesta, at hetta er fatanin hjá stjórnini, og tískil eisini útgangsstøðið hjá dønum til komandi tingingar.

Anders Fogh Rasmussen hevur áður gjørt greitt, at við fleiri yvirtøkum verður blokkstuðulin minkaður samsvarandi.